# Stórur stuðul til Ung i Norden 2006

**Ungdómslistastevnan Ung i Norden, sum verður í Føroyum næsta ár, hevur fingið 1, 75 mill í stuðli frá barna- og ungdómsnevndini hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum. - Hetta er ein stór álitisváttan til okkara mentanarlív, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum**

UNG I NORDEN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í fjør bjóðaðu Føroyar seg fram at fyriskipa Ungdómslistastevnuna Ung i Norden 2006. Hesum játtaði barna- og ungdómsnevndin hjá Norðurlanda Ráðharraráðnum, BUK, í heyst. Stevnan verður hildin í Føroyum um mánaðarskiftið juni-juli 2006, tá eini 250 ung úr øllum Norðurlondum íroknað Sámalandi koma til Føroya at luttaka.

### Spennandi og væl fyrireikað

Tað er BUK, sum hevur ábyrgd av stevnuni, og í døgunum 16. og 17. juni 2005 vóru tey á fundi við føroysku fyriskiparanar.

Ein verkætlanarbólkur við umboðum fyri Mentamálaráðið, Norðurlandahúsið, Tórshavnar kommunu, Føroya Ungdómsráð og Meginfelag áhugaleikara Føroya hevur arbeitt við fyrireikingunum til stóru Ungdómslistastevnuna. Hedvig Westerlund-Kapnas, ið m.a. hevur drúgvar royndir at fyriskipa mentanarstevnurnar Ung í Føroyum, er sett sum verkætlanarleiðari.

Á fundinum í Føroyum fekk BUK kunning um ítøkiligu ætlanirnar og fyrireikingarnar í sambandi við Ung i Norden 2006. BUK metti verkætlanina vera sera væl fyrireikað og spennandi. Nevndin avgjørdi at játta kr. 1,75 mió í stuðli til Ung i Norden 2006, og er hetta størsti einstaki stuðul, sum BUK hevur givið til Ung i Norden.

### Álitisváttan

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, sigur, at hann er sera fegin um stuðulin frá BUK. Samstundis hevur Mentamálaráðið játtað tilsamans kr. 500.000 í stuðli til Ung i Norden 2006 býtt yvir tvey ár.

- Hetta er stór álitisváttan til okkara mentanarlív, sum hevur átikið sær at skipa fyri hesum megnar norðurlendska mentanartiltakinum fyri listaáhugað ung. Hetta er stór avbjóðing eisini fyri okkum sum vertsland, og eg ivist ikki í, at føroyska mentanarlívið og serliga skapandi ungdómsmentanin her heima fáa stórt gagn av slíkari stevnu. Eg eri tí fegin um, at eisini Mentamálaráðið kann veita hollan stuðul til Ung i Norden 2006, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður.

Meira um BUK og norðurlendskt barna- og ungdómsmentanarsamstarv er at finna á www.valhalla.norden.org.

# Nepper fer

**Eftir at hava virkað sum fúti í Føroyum í eitt langt áramál, fer Mogens Nepper-Christensen úr starvi seinast í september mánaði í ár**

LØGREGLA
*Snorri Brend*

Danska løgmálaráðið boðar nú frá, at starvið sum fúti í Føroyum er leyst at søkja frá 1. oktober í ár.

Hetta hendir eftir at Mogens Nepper-Christensen eftir kongaligari resolutión frá 6. apríl fer úr starvi sínum hin 30. september í ár vegna aldur.

Starvið sum fúti í Føroyum verður áramálssett í fimm ár, og er eitt tænastumanastarv í 38. lønarstigi. Við starvinum fylgir eisini bústaður.

Løgmálaráðið heitir á øll um at søkja – óansæð aldur, kyn, rasu, religión ella tjóðarsamleika.

Freistin at søkja starvið er úti 15. august 2005 kl. 16:00.



*Mogens Nepper-Christensen leggur nú frá sær sum fúti vegna aldur*

# Samverkamenn til Birmingham

*Tíðindaskriv*

Í hesi vikuni fer eitt ferðalag upp á 10 fólk frá føroyska missiónsfelagsskapinum "Samverkamenn" til Birmingham í Onglandi at boða kristna gleðiboðskapin fyri asiatum og muslimum í býar-partinum "Elim Rock", har 95 prosent av íbúgvunum eru muslimar. Birmingham er næststørsti býur í Onglandi, og helvtin av íbúgvunum eru litt.

Í løtuni arbeiða hjúnini Shamila og Høgni Johannesen úr Havn í Birmingham sum trúboðarar.

Samskipari av ferðini, sum verður frá 7. til 17. juli, er Janus Gunnarsson frá Samverkamonnum.

Meðan ferðalagið er burtur, vera myndir hvørt kvøld lagdar út á heimasíðuna hjá Samverkamonnum saman við eini frásøgn frá degnum. Áhugað kunnu fylgja við á heimasíðuni: www.samverkamenn.org.



*10 føroyskir missionerar fara í hesi vikuni til næst størsta býin í Onglandi*

# Neyðhjálp til Asia stendur órørd

**Ein rúgva av tí neyðhjálp, sum allur heimurin sendi til vanlukkuøkið í fjareystri eftir flóðalduvanlukkuna 2. jóladag í fjør, stendur órørd bæði á Sri Lanka og í Indonesia. Ein av høvuðstrupulleikunum er pappírsveldi í vanlukkuraktu londunum**

NEYÐHJÁLP
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Nú er komið fram, at ein rúgva av teirri neyðhjálp, ið bleiv send til vanlukkuøkini í Fjareystri eftir flóðalduvanlukkuna 2. jóladag í fjør, stendur órørd. Millum annað standa ikki færri enn 1.500 bingjur við neyðhjálp órørdar í havnabýnum Medan nærheindis Banda Aceh í Indonesia. Reyði Krossur i Føroyum er tó sannførdur um, at føroyska hjálpin er komin fram*

*Mynd: Reuters*

Sambært norskum fjølmiðlum er støðan tann, at á Sri Lanka standa umleið 500 bingjur við neyðhjálp órørdar á bryggjuni í høvuðsstaðnum Columbo. Í havnabýnum Medan nærheindis hart rakta Banda Aceh økinum í Indonesia standa ikki færri enn 1.500 bingjur órørdar.

### Væntandi skjøl og strangar innflutningsreglur

Høvuðsorsøkin við bingjunum á Sri Lanka er tann, at tey neyðugu skjølini ikki eru tøk, seinar mannagongdir hjá pappírsveldinum á oynni, og harafturat hava teir lokalu distributørarnir ilt við at taka sær av øllum vørunum, ið koma sendandi úr øllum hornum av heiminum.

Í Medan í Indonesia eru trupulleikarnir ikki minni. Sum dømi um neyðhjálp, ið ikki er komin fram, tí hon stendur fast á bryggjuni í Medan, verður nevnt ein sending við átta bingjum av drekkivatni, ið var sent úr Avstralia minni enn eina viku, eftir at flóðaldan hevði rakt. Hesar átta bingjurnar við reinum vatni hava staðið á bryggjuni í Medan síðani síðst í januar mánað, tí at Reyði Krossur í Indonesia misti fylgiskjølini burtur, tá ið hjálparfelagsskapurin flutti skrivstovu um sama mundi.

Indonesiskir tollmyndugleikarnir vátta eisini, at okkurt um hálvthundrað akfør, sum skulu hjálpa til bæði við upprudding og at byggja upp aftur í Aceh-landspartinum, framvegis standa á bryggjuni og bíða eftir at fáa innflutningsloyvi.

At tollmyndugleikarnir í Indonesia eru tungir at dansa við, kann ST eisini staðfesta, tá ið felagsskapurin noyddist at brúka ikki færri enn tveir mánaðar upp á at fáa innflutningsloyvi til 14 sjúkrabilar í Indonesia.

Harvið kann staðfestast, at sjálvt um tørvurin á neyðhjálpini er sera stórur, so er ein rúgva av neyðhjálp tøk, um altso eisini neyðug útflýggjanarloyvi og skjøl eisini vóru tøk.

### Reyði Krossur í Føroyum kennir einki til trupulleikan

Nærliggjandi er so at spyrja, um øll neyðhjálpin, ið varð send úr Føroyum, liggur í onkrum av bingjunum á bryggjunum í eitt nú Columbo og Medan, men sambært Suna Vinther hjá Reyða Krossi í Føroyum, er hetta lítið sannlíkt.

Suni Vinther sigur seg einki kenna til trupulleikan, og hann er sannførdur um, at øll neyðhjálpin úr Føroyum er komin upp á pláss. Somuleiðis vísir Suni Vinther á, at altjóða Reyði Krossur hevur fólk á staðnum, har neyðhjálpin verður býtt út, og harvið skuldi hjálpin komið út til teirra, ið hava størstan tørv á henni.